# Framtíðarinnar ruskskipan fyri fiskiskipaflotan



*Ruskið verður kroyst saman við 10 tons stórum trýsti og fyllir tí ógvuliga lítið í mun til vanligt burturkast*

**Nú er ikki neyðugt at tveita burturkast frá skipum í havið til bága fyri havumhvørvið**

NAFF
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroyingar eru ikki kendir fyri at vera tann tjóðin, sum dálkar minst í heiminum – eftir fólkatalinum. Í altjóða høpi munnu vit eiga okkara stóra lut í teirri dálking, sum fer fram á havinum. Tað tekur tíð at broyta hugburð. Hetta er kent á so mongum økjum - og ikki minst innan umhvørvisvernd.

Lítið man vera at ivast í, at okkara fiskifloti telist millum tey mest dálkandi fiskiførini í heiminum, tí uttan fyrilit fyri havumhvørvinum verður hópur av burturkasti tveittur í havið.

Men hetta er ikki neyðugt. Møguleikar eru í dag at kroysta burturkastið, soleiðis at tað fyllir minst møguligt, tá ið tað verður tikið í land eftir loknan túr.

## Norsk skipan

Á North Atlantic Fish Fair hevði firmaið hjá hjúnunum, Theodor og Katrini Poulsen á Toftum, TheoKat, ein faldara um ein sonevndan "komprimator" úr rustfríum stáli, sum er ætlaður til rust umborð á skipum.

Tað er felagið, Delitek AS í Noregi, ið hevur framleitt hesa skipan, sum kroystir ruskið saman, soleiðis at tað fyllir minst møguligt.

Theodor sigur, at honum kunnugt finst ein slík skipan bert umborð á heilt fáum føroyskum skipum, nevniliga Tjaldrinum og Brimli.

– Skipanin, sum vit umboða, kann kroysta ruskið saman við 10 tons stórum trýsti, soleiðis at tað fyllir lítið og einki í mun til, tá ið tað ikki verður kroyst saman, sigur hann.

Theodor sigur, at norska skipanin tekur lítið pláss og er ætlað at standa á dekkinum á skipinum.

– Inni í "komprimatorinum" er ein sekkur, sum verður fyltur, kroystur og koyrdur í land, tá ið skipið kemur í havn. Sekkurin er næstan tættur, og tá ið luftin verður kroyst úr honum, stendst at kalla eingin roykur av ruskinum, sum er í sekkinum, sigur Theodur Poulsen.

# NAFF stóð sína ro

**At NAFF er sloppin av við tjøldini, sum vóru partur av framsýningini í 2001 og 2003, tænir øllum pørtum – og ikki minst tí altjóða dámi, sum ein tílík framsýning eigur at hava**

NAFF
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Á eini so stórari fiskivinnuframsýning, sum North Atlantic Fish Fair, er nógv at síggja, og hjá tær sum tíðindamanni er ikki lætt at velja burtur úr, hvar tú best kanst brúka tína orku teir dagarnar, stevnan varir. At vitja einar 250 framsýnarar, har fleiri enn 300 einstakir framsýnarar eru á básunum, er næstan ógjørligt. Tú kanst steðga á og spyrja teg fyri, men tað er ógjørligt at fregnast um alt, tú sært.

Hvør framsýnari er á sín hátt áhugaverdur, og tú verður snøgt sagt "bumbaður" við information.

## Sos-básur

Eins og á fiskivinnuframsýningini í 2003, sum var á økinum hjá Runavíkar havn, hevði Sosialurin eisini bás hesaferð við blaðredaktión og tveimum blaðmonnum. Myndamaður okkara vitjaði eisini framsýningina, tá ið stundir vóru til tess.

Fólk stukku inn á gólvið - av áhuga og forvitni, men eisini tí, at tey høvdu okkurt upp á hjarta.

Samrøður vórðu gjørdar inni á básinum, og vit vitjaðu eisini dúgliga runt um í stóru høllini.




*Stjórin á Føroya Fiskavirking, Meinhard Jacobsen, vitjar á básinum hjá Havsbrún, har Bergur Poulsen tekur ímóti*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Væl vitjað

Nú triðja altjóða fiskivinnuframsýningin í Føroyum er av, eru fyrireikararnir væl nøgdir við undir-tøkuna, sum stevnan hevur fingið.

Í vavi var framsýningin á leið tann sama, sum á seinastu stevnuni, sum varð hildin á økinum hjá Runavíkar havn, men í høllini á Sandvíkarhjalla var rúmligari, og tað hevði avgjørt sínar stóru fyrimunir, at øll framsýningin var undir einum og sama taki.

At NAFF er sloppin av við tjøldini, sum vóru partur av framsýningini í 2001 og 2003, tænir øllum pørtum – og ikki minst tí altjóða dámi, sum ein tílík framsýning eigur at hava. Einki ringt er at siga um tjøldini, tá ið veðrið er gott, men so skjótt tað lotar úr hanakjafti, gerst kalt inni, og framsýningin hevur ikki tann hugna yvir sær, sum ein altjóða framsýning eigur at hava.

## Fleiri greinar

Í komandi bløðum fara vit at hava fleiri greinar um fyritøkur, sum vóru við á North Atantic Fish Fair.

Vit fara eitt nú tosa við trolvirkið, Bergið í Hvalba, Havsbrún í Fuglafirði, Oilwind í Miðvági, Teymavirkið í Runavík, Tórshavnar Skipasmiðju og Vónina í Fuglafirði. Eisini fara vit at hava grein um nýggja tekniska útgerð til skip og bátar, sum radiohandlar selja.